## Nummar 15 í heiminum

Tær 50 bestu matstovurnar í heiminum vórðu tilnevndar á samkomu í London í fyrradagin. Millum hesar er Noma, sum heldur til á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn. Í fjør gjørdist Noma nummar 33 á listanum, og framgongdin upp á 18 pláss var eisini størsta framgongdin hja nakrari matstovu hetta árið. Talan er um norðurlendskan køk, sum er á matstovuni, og stórur dentur verður lagdur á síðbundnu matgerðina í hesum. Samlaði listin, har spanska El Bulli er á odda, kann síggjast www.theworlds50best.com/2007_list.html

## Løgreglan til Kili

Tveir føropyskir løgreglumenn eru farnir til suðuramerikanska landið Kili saman við tveimum fólkum frá ferðaliðnum hjá donsku løgregluni í sambandi við eldsbrunan umborð á trolaranum Hercules. Skipið er skrásett í Føroyum og tískil føroyskt øki í løgfrøðiligum høpi. Ein sleipibáturin tók Hercules upp á sleip og skuldi koma inn til býin Valparaiso í Kili við trolaranum um middagsleitið í dag. Tað brennur ikki umborð longur.

# Føroysk fyrisitingarsøga útgivin í bók

**Í síðstu viku kom út bók við keldum til føroyska fyrisitingarsøgu og um fyrisitingarsøgu í Grønlandi, Íslandi og donsku tropukoloniunum**

ÚTGÁVA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

»Nordatlanten og Troperne«. Soleiðis nevnist bók, ið »Kildeskriftsselskabet« í Danmark júst hevur givið út. Bókin er tann fimta í røðini um danska fyrisitingarsøgu og er ein handbók um fyrsitingarsøguligar keldur í Føroyum, Grønlandi, Íslandi, Ostindia, Guinea og Vestindisku Oyggjunum.

Tað eru føroyskir, grønlendskir, íslendskir og danskir skjalavørðar, ið allir hava stóran kunnleika til fyrisitingarsøgu, sum hava skrivað bókina.

Hvør einstøk av teimum 71 keldunum, ið eru í bókini, er lýst við frágreiðing um nýtsluna og lógargrundarlag. Partar av skjølunum eru avskrivaðir og endurgivnir við viðmerkingum og orðalýsingum. Eisini eru viðkomandi bókmentir tilskilaðar fyri hvørja keldu.

Føroyski parturin, ið fevnir um 85 síður, er sera fjølbroyttur, skrivar Føroya Landsskjalasavn í tíðindaskrivi. Her eru millum annað grein um guvubátin Beskytteren í 1901, skúlaeftirlit heima á Sandi í 1934, rúsdrekkalógina í 1907 og grindaroknskap.

Landsskjalasavnið skrivar, at bókin er sera hent hjá teimum, ið hava áhuga fyri fyrisitingarsøgu. Hon gevur møguleika at samanbera fyrisitingina í ymsum pørtum av danska ríkinum, umframt at hon sigur frá serligum keldum, ið eru staðbundnar. Til dømis føroysku grindaroknskapunum.



*Bókin um millum anna føroyska fyrisitingarsøgu fæst til keyps á Landsskjalasavninum og kostar 195 krónur*

# Stættastríðið ikki av

Keypiorkan hjá ófaklærdum tímaløntum stendur at kalla í stað, meðan tað hjá øðrum lønarbólkum hevur verið stór framgongd seinastu árini. Hetta vísir nýggj kanning.

Tað er búskaparfrøðingurin Magni Laksáfoss, sum hevur gjørt kanningina, sum vísir, at arbeiðarar hava havt ein minni vøkstur í keypiorkuni enn flestu aðrir løntakarabólkar í tíðarskeiðinum 2003-2006. Hetta er galdandi, óansæð um talan er um fulla ella niðursetta tíð. Fyri arbeiðarar við niðursettari arbeiðstíð hevur verið talan um fall í keypiorkuni.

Hetta stendur at lesa inni á heimasíðuni hjá Samtak, sum hevur tíðindi og kunning frá arbeiðarafeløgum.

Sum heild kann sigast, at tey sum vóru lutfalsliga væl fyri í 2003 eru vorðin nógv frægari fyri í 2006 meðan tey, sum hava nakað lægri keypiorku í 2003 ikki eru ríkari í 2006. Tvørturímóti er keypiorkan hjá einum arbeiðsfólki, sum arbeiðir niðursetta tíð vorðin verri fyri í 2006 í mun til 2003.

Fyri fólk, sum starvast í fiskavirkjum eru nógv, sum ikki arbeiða fulla tíð orsaka millum annað av rávørumangli. Hóast fiskavirkisskipanin hjá ALS munar nakað, so er útgjaldið úr henni einans fyri 4 av 5 arbeiðsdøgum í eini viku, umframt at útgjaldið er í mesta lagi 70 prosent av eini arbeiðaraløn. Tá er talan um fitt av fólki, ið hevur lægri keypiorku í 2006 í mun til 2003.

Úrslitið av kanningini stendur at lesa á heimasíðuni www.samtak.fo

# Hálva øld við barnagarði í Klaksvík

**Komandi vikuskiftið eru 50 ár liðin síðani Drotning Margrethu barnagarður í Klaksvík varð vígdur, tann 29. apríl 1957**

BARNAANSING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Dr. Margrethu barnagarður í Klaksvík er millum fyrstu barnagarðar í Føroyum, og var einasti barnagarður í Klaksvíkar kommunu heilt fram til 1997.

Tað var nevndin í KFUM & K, sum tók stig at seta á stovn barnagarð í Klaksvík, og fekk hann tá navnið Barnagarður KFUM & K's.

Í teimum nógvu og væl útgreinaðu skjølunum og fundarfrásagnum, sum eru um viðurskifti í barnagarðinum, sæst hvussu eldsálir hava stríðst fyri at fáa endarnar at røkka saman við m.a. eydnuhjóli og lutaseðlum.


*Eldri mynd úr barnagarðinum í KFUM og KFUK í Klaksvík*

Skjølini vísa dømi um stríðið hjá nøkrum eldsálum at skipað fyri tænastum, sum kommunan í dag tekur sær av.

Í 1979 varð Barnagarður KFUM & K's útbygdur og fekk tá navnið Dr. Margrethu Barnagarður. Barnagarðurin hevur í dag eina áseting uppá 94 børn.

Nógv virðismikil skjøl eru, sum siga ikki so lítið um hvussu okkara samfelag hevur ment seg. Í áhugaverdari mynda- og skjalaframsýningini sum fólk fáa høvið at síggja leygardagin, er møguleiki at síggja í smálutir m.a. kostnaðin av at innrætta barnagarðin, leikum, lønarbroytingar og broytingar í barnaansingargjøldum.

Viðurskiftini við donsku myndugleikarnar koma eisini til sjóndar í skjølunum. Eitt skjal vísir nevniliga, at tá barnagarðurin varð stovnaður, átti ásetingin eftir fermetrum at verða 52 børn, men "overinspektionen" helt, at við tað, at tað var ein føroyskur barnagarður, kundi ásetingin verða 60 børn.

Leygardagin verður móttøka í barnagarðinum frá klokkan 10 til 14, har øll eru hjartaliga vælkomin!

Til móttøkuna verða røður, sangur, okkurt til matna og framsýning við hópin av myndum, ið eru tiknar hesi 50 árini.